

## Símun liðugur í Intertoto

Keflavík spældi í gjár seinna dystin ímóti norska felagnum Lillestrøm í Intertoto kappingini. Dysturin var spældur í Íslandi, og hann endaði við 2-2 javnleiki. Lillestrøm vann fyrra dystin heili 4-1, og tí var tað norska felagið, sum fór víðari í kappingini. Símun Samuelsen byrjaði dystin á vinstra miðvølli, og hann spældi til 67. minutt, tá ið hann var skiftur út. Lillestrøm kom á odda 2-0, men Keflavík javnaði við tveimum málum í 66. og 68. minutti.

## Kahn er ein stórur ítróttarmaður

Týski málmaðurin Oliver Kahn hevur boðað frá, at hann gevst at spæla fyri týska landsliðið. Kahn var eykamálamaður hjá Týsklandi undir HM, tí venjarin vildi heldur hava Jens Lehmann at verja málið.

– Eg kann ikki rósa Kahn nóg mikið. Hann vísti seg sum ein stóran ítróttarmann, tá vit valdu Jens Lehmann at verja málið á landsliðnum undir HM, sigur Jurgen Klinsmann, landsliðsvenjari.

– Eg má takka honum fyri stóra avrikið til frama fyri liðið undir HM, sigur hann.

Oliver Kahn heldur tó fram at spæla fyri týska meistaraliðið Bayern Munchen.

B68-ÍF 1-1 (1-1):

# Status quo í botninum



*B68 og ÍF áttu hvør sín hálvleik í botndystinum á Toftum, og tey fingu eitt mál í part*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

B68

ÍF

**B68 og ÍF áttu hvør sín hálvleik, men bæði málini í botndystinum á Toftum vórðu skorað í fyrra hálvleiki. Aðrir kjansir vóru at gera mál, men hvørki liðið kláraði at tryggja sær sigurin, og so var støðan í botninum tann sama sum undan dystinum**

B68-ÍF
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

B68 var rættiliga í miðdeplinum undan botndystinum ímóti ÍF á Toftum sunnudagin. Venjarin Jóannes Jakobsen gavst í starvinum um vikuskiftið, eftir at spælarar og leiðsla høvdu havt fund hóskvøldið.

Nýtt venjarapar til dystin sunnudagin var Julian Johnsson og Edmund Jacobsen, og teir skuldu fáa B68-liðið at fóta sær eftir avsmurningin á Eiði seinasta mánakvøld.

Tann stóra venjaraeffektin fekst ikki burturúr hesaferð, men framgongdin var so fræg, at B68 fekk javnleik burtur úr dystinum ímóti ÍF.

ÍF lá aftast – eitt stig aftanfyri B68 – og taparin av dystinum hevði komið sær í eina sera keðiliga støðu. Hinvegin kundi vinnarin fáa eitt sindur av luft í botnstríðnum.

### Málini komu í fyrra hálvleiki

B68 byrjaði dystin betur enn ÍF. Fyrsta hálva tíman sat B68 á tí mesta, meðan ÍF als ikki spældi seg til nakran veruligan málkjans.

Longu eftir ein minutt spældi B68 seg til fyrsta kjansin, tá ið Julian Johnsson stútaði ímóti málinum, men Andras Gango bjargaði.

Málini í dystinum komu bæði í fyrra hálvleiki, og tað vóru bert tríggir minuttir ímillum tey.

Tað var B68, sum legði fyri, tá ið Kristian Anton Andreasen, ið spældi væl í høgru síðu, fór fram við einum ÍF-verjuspælara og legði innfyri málið. Har kom Jann Ingi Petersen og stórleypandi, og hann setti høvdið á bóltin, sum streyk í málið til 1-0.

Lítla løtu seinni var galið í hinum endanum. Atli Petersen varð feldur av B68-málverjanum, og so kundi dómarin ikki gera annað enn at døma brotsspark. Tað setti Bartal Eliasen trygt í málið 1-1.

### ÍF tók yvir

ÍF hevði verið púra fyri ongum fyrsta hálva tíman, men eftir at B68 hevði skorað, kom liðið betur við í dystinum, og í seinna hálvleiki vóru tað fuglfirðingar sum høvdu leikliga yvirvág.

Hanus Eliasen stríddist ófört í álopinum, og við einum væl uppløgdum Høgna Zachariasen á framrættaðum miðvallarplássi skapti ÍF av og á vandamiklar støður kring B68-málið.

Dánjal Pauli Højgaard hevði ein lobbara, sum B68-málverjin fekk bjargað, Hanus hevði skot úr góðari støðu, og Høgni Zachariasen søkti meira enn einaferð á málið við stútarum. Harafturat vóru eisini fleiri deyðbóltsstøður, sum ÍF royndi at gera sær dælt av.

B68 spældi í seinna hálvleiki meira kontra, og teir komu eisini til onkrar kjansir. Súni Fríði Barbá hevði ein góðan kjans, tá ið hann setti høvdið undir bóltin við aftaru stong, men stútarin fór við síðuna av málinum. Innskifti Ralph van Dooren hevði eisini eina góða skotroynd, men ÍF-málverjin bjargaði.

Endin var tí, at hvørki av liðunum fekk sigursmálið, sum tey so gjarna vildu hava, og javnleikur hevði við sær eitt sig í part. ÍF er tí framvegis aftast og B68 næstaftast í Formuladeildini.

## Javnleikur var á góðari leið

Bæði B68 og ÍF vildu sera gjarna vinna botndystin á Toftum í gjár, men toppskjúttin hjá B68 ásannaði eftir dystin, at javnleikurin var eitt rættvíst úrslit.

– Vit høvdu yvirtakið í fyrra hálvleiki, men teir komu sera væl við í seinna hálvleiki. Bæði liðini høvdu kjansir at gera sigursmálið, men eg haldi, at javnleikur mundi verða á góðari leið, sigur Súni Fríði Barbá.

– Liðini stríddust sera væl, og tað var ferð á spælinum, hóast tað ikki var so polerað allatíðina. Bæði vit og teir royndu at vinna dystin, og tí var dysturin undirhaldandi, sigur hann.

## Símun vildi hava meira

Símun Eliasen hjá ÍF var ikki nøgdur við, at hansara lið hevði fingið javnleik á Toftum sunnudagin.

– Vit fóru á Toftir fyri at vinna dystin, og eg eri ikki nøgdur við, at vit bert fingu javnleik, sigur hann.

– Um vit taka gongdina í øllum dystinum, so var javnleikur eitt hóskandi úrslit. Teir vóru betur stóran part av fyrra hálvleiki, tá vit vóru eitt sindur ótryggir, men í seinna hálvleiki høvdu vit meira spæl og høvdu eisini fleiri kansir at skora.

ÍF hevur nú ein dyst eftir at spæla, og hann verður longu mikukvøldið á Eiði, har toppliðið EB/Streymur tekur ímóti.

– Uppgávan er trupul, og á pappírinum eru teir favorittar. Skulu vit hava nakað burturúr, so skulu vit hava ein góðan dag, sigur Símun Eliasen.